## 3200 færri lærarar um 10 ár

Donsku fólkaskúlarnir mugu klára seg við 3200 færri lærarum tye komandi 10 árini, uttan at tað gongur út yvir talið av børnum fyri hvønn lærara. Orsøkin til hetta er at finna í lítlum árgangi av ungdómum. - Tað verða færri næmingar í danska fólkaskúlanum. Tað eigur at merkja, at tað eiga at verða færri lærarir, um ein skal halda fast við lutfallið millum talið av lærarum og næmingum, sigur kenslumálaráðharrin, Tina Nedergaard til P3 Nyheder.



## Tveir bilar horvnir

Løgreglan í Havn leitar eftir tveimum bilum, sum um vikuskiftið eru stolnir - og horvnir. Leygarnáttina fekk løgreglan í Havn fráboðan um, at ein Toyota-bilur varð horvin á kajøkinum, aftanfyri Smyril Line. Talan er um ein si lvurlittan Toyota Corolla frá 1993, við nummarspjaldrinum BK 444. Seinni bilurin er ein grønur Audi A4 við nummarspjaldrinum DM 334. Fráboðan um henda bilin kom til løgregluna seint seinnapartin leygardagin.

# Øll toskaaling í Føroyum er fyribils søga



**Fyri fáum árum síðan vóru vónirnar um aling av toski av Føroyabanka rættiliga bjartar. Hesin fiskur hevur góðar vakstrareginleikar, og mong vóru tey, sum mundu halda, at nú bíðaði okkum eitt rættiligt nýbrot og ævintýr í føroyskari alivinnu. Men líka so stórar, sum vónirnar vóru, líka so sikkurt er tað í dag, at øll toskaaling í Føroyum fyribils er søga**

TOSKAALING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Norðmenn munnu vera teir her um okkara leiðir, sum hava gjørt flestar royndir við aling av toski, men í dag eru bert fáa feløg í Noregi, sum hava vinnuliga toskaaling.

Tá hugt hevur verið í norsk bløð eftir úrslitum hjá toskaalarum, hava stór reyð tøl verið á botnlinjuni hjá teimum flestu. Men tað var eisini tann tíð, tá vónirnar hjá norðmonnum um toskaaling vóru bjartar.

Fyri hálvum triðja ári síðan fingu norskir alarar ”knallgóðan” prís fyri aldan tosk. Onkur fyritøka, vit leitaðu fram og nevndu, hevði tikið 200 tons av toski í eitt ár, sum vórðu seld fyri ein miðalprís uppá einar 50 krónur fyri kilo.

### Lagt á hillina

Í Føroyum hava eisini tvær royndir verið gjørdar við aling av toski, ein í kørum í Hvalba og ein í ringum á Árnafirði. Faroe Cod Farming átti virksemið í Hvalba, og Bakkafrost átti virksemið á Árnafirði.

Sosialurin hevur tosað við Richard Rognsøy, sum var stjóri í felagnum í Hvalba og við Regin Jacobsen, sum er stjóri í Bakkafrost.

Tað er nú ein tíð, síðan seinastu toskarnir, sum gingu í kørunum í Hvalba, vórðu tiknir til sláturs, og í fjør summar tók Bakkafrost seinastu toskarnar úr ringunum á Árnafirði.

Í Hvalba hevur talan verið um at útbyggja toskaalingina við nøkrum nógv størri kørum enn teimum verandi, og áður hevur eisini ljóðað, at ætlanin í Hvalba stóð og fall við lendisviðurskiftunum til ætlaðu útbyggingina og møguleikunum fyri fígging.

Talan hevur eisini verið um, at Richard Rognsøy hevði ætlanir um at flyta toskaalingina til Noregs, um neyðugu karmarnir ikki kundu fáast upp á pláss í Hvalba.

Men í dag er Richard ikki so bjartskygdur um toskaaling, tí prísirnir á aldum toski eru falnir so ógvuliga nógv.

Hann vísir á, at tá ætlanin í Hvalba varð sett á kjøl, kundi aldur toskur seljast fyri einar 35-40 krónur fyri kilo, men í dag fæst ikki meiri enn tað hálva fyri hendan fiskin.

Flestu fiskaprísir hava verið fyri stórum falli, síðan búskaparkreppa fór at herja um lond, og hetta hava so toskaalarar so sanniliga eisini merkt sviðan av.

Richard Rognsøy sigur, at soleiðis, sum marknaðarstøðan er vorðin, verður eingin toskaaling aftur í Hvalba fyribils. Hinvegin hava hvalbingar ikki púrasta slept ætlanunum um aling.

- Vit umhugsa um at søkja um loyvi til laksaaling her suðuri, men enn eru vit ikki komin stórt longri enn tað, sigur hann.

Hann vísir á, at gongdin í laksaalingini er nógv áhugaverdari enn toskaaling í løtuni, og tí umhugsa vit at søkja um loyvi til laksaaling, sigur hann.

- So leingi, sum prísútlitini á aldum toski ikki eru betri, enn tey eru nú, kunnu vit siga, at toskaaling í Hvalba er løgd á hillina fyribils.

Richard Rognsøy sigur seg á standandi fót ikki kunna siga, hvussu nógv toskaalibrúk eru virkin í Noregi í løtuni, men hann heldur, at nú eru bert fá eftir.

### Eina royndarætlan

Regin Jacobsen, stjóri á Bakkafrost, sigur, at tey vórðu liðug at taka toskin, sum gekk í ringum á Árnafirði, í fjør summar, og í løtuni eru ongar ætlanir um at seta toskayngul útaftur.

- Hetta var ein roynd, vit vildu gera, og vit mugu siga, at biologiskt eydnaðust royndin væl. Tað ber væl til at ala tosk, og fiskurin trívist og veksur skjótt og væl.

Regin vísir á, at Bakkafrost setti umleið 100.000 toskayngul út á Árnafirði, harav meginparturin var toskayngul undan toski av Føroyabanka.

- Biologiskt var úrslitið við royndini á Árnafirði fult so gott, sum úrslitini hjá okkara kappingarneytum aðrastaðni.

Stjórin í Bakkafrosti sigur, at skal lønsemi vera í toskaaling í Føroyum, er neyðugt, at prísirnir fyri kruvdan fisk við høvdi í minsta lagi liggur um einar





*Richard Rognsøy, stjóri í Faroe Cod Farming og Regin Jacobsen, stjóri í Bakkafrost, eru samdir um, at toskaaling fyribils er løgd á hillina*